UTTAN ÚR HEIMI

# Kvinnur taka seg saman ímóti harðskapi

**Í teimum ríku londunum er harðskapur er tann mest vanliga deyðsorsøkin hjá kvinnum ímillum 16 og 44 ár. Nú gava 24 kvinnur, sum eru ráðharrar í heimlondunum, tikið seg saman at forða harðskapinum**

HARÐSKAPUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Herfyri fór Amnesty International undir eitt átak, sum skal forða harðskapi ímóti kvinnum, og hesin sami trupulleikin er eisini eitt av høvuðsevnunum á ársfundinum hjá ST-mannarættindanevndini, sum er í Geneve í hesum døgum.

Har hevur sveitsiski uttanríkisráðharrin, Michaline Calmy-Rey, tikið stig til at sameina kvinnur í leiðandi politiskum størvum til at virka ímóti harðskapinum ímóti kvinnum.

– Vit kunnu ikki góðtaka harðskap ímóti kvinnum, og her tosa vit bæði um neyðtøku, umskering, fátækradømi, sálarligan ágang, handil við kvinnum og skøkjulevna, sigur Michaline Calmy-Rey við fronsku tíðindastovuna AFP. Hon vísir á, at í teimum ríku londunum doyggja fleiri kvinnur av harðskapi enn av krabbameini og í ferðsluvanlukkum.

Tær 24 kvinnurnar, sum hava skipað bólkin ímóti harðskapi, eru ráðharar í fleiri londum, eitt nú Avstralia, Svøríki, Kolumbia, Fraklandi, Eysturríki, Japan, Filipsoyggjunum, Rwanda, Suðurafrika, Jemen og Jordan.

# Móttikin sum hetja



*Fyrrverandi leiðarin hjá ST-vápnaeftirlitsmonnunum, sviin Hans Blix, bleiv móttikin sum hetja, tá hann fyrradagin kom á ST-høvuðsborgina í New York at signera bókina "Disarming Iraq", sum Blix hevur skrivað um vápnaleitingina í Irak. Í dag verður ásannað, at Blix hevði rætt, tá hann segði, at Irak hevði ikki tey hópoyðingarvápnini, sum USA og Bretland vildu vera við, at landið hevði*

# Týskarar stúra fyri yvirgangi

**Aftan á atsóknina í Madrid bera nógvir týskarar ótta fyri, at yvirgangsmenn fara at søkja at har. Teir krevja tí, at myndugleikarnir skulu halda eitt vakið eyga við fremmandafólki**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Tað slepst ikki undan at nýta makt í bardaganum ímóti yvirganginum, men bardagin verður ikki vunnin við hermegi eina. Vit mugu eisini beina fyri rótini til yvirgangin, fátækradøminum og vantandi menning, segði týski kanslarin, Gerhard Schrøder, tá hann týsdagin hitti franska forsetan, Jacques Chirac.

Andstøðuleiðarin, Angela Mærkel, er samd við kanslaranum.

– Tað snýr seg ikki um at hava stríðsvognar á varðhaldi uttan fyri tinghúsið í Berlin, sjálvt um vit mugu ásanna, at hermegin er tað best egnaða vápnið ímóti yvirganginum, segði hon í gjár.

Atsóknin í Madrid í síðstu viku verður sett í samband við, at Spania stuðlaði USA í krígnum í Irak. Tað gjørdi Týskland ikki, men týski innanríkisráðharrin, Otto Schily, ávarar týskarar ímóti at halda, at teir kunnu kenna seg tryggar. Hann vísir á, at Týskland hevur hermenn í Afghanistan, og at atsóknin 11. september í 2001 bleiv fyrireikað í Hamburg. Tí hevur innanríkisráðið givið løgregluni boð um at herða eftirlitið á jarnbreytarstøðum og aðrastaðni.

Men nógvir týskarar kenna seg ikki tryggar kortini. Teir krevja, at myndugleikarnir skulu halda eyga við fólki av fremmandum uppruna, og at fremmandafólk, sum eru undir illgruna, skulu vísast av landinum.

# Bush mælir til samanhald

**– Yvirgangsmenninir drepa ósek fólk fyri at ræða heimin. Teir eru eirindaleysir drápsmenn, sigur amerikanski forsetin, sum mælir teimum sameindu hjá USA til at standa saman**

SAMANHALD
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

George W. Bush, forseti, er ørkymlaður av ætlanini hjá komandi sponsku stjórnini at taka teir sponsku hermenninar úr Irak.

– Tað er av avgerandi týdningi, at vit standa saman um at hjálpa irakska fólkinum. Al-Qaeda vil hava okkum at fara úr Irak, tí teirra ætlan er, at demokratiið og frælsið skulu tapa stríðið, segði Bush aftan á ein fund við niðurlendska forsætisráðharran, Jan Peter Balkamende.

Amerikanski verjumálaráðharrin, Donald Rumsfeld, stúrir ikki so nógv fyri ætlanini hjá komandi sponsku stjórnini, tí hann heldur ikki, at tað verður nakar trupulleiki at fáa hermenn úr øðrum londum ístaðin fyri teir sponsku.

– Eg vænti, at onnur lond fara at hugsa øðrvísi enn Spania. Eg vænti, at fleiri fara at bjóða seg fram, segði Rumsfeld við BBC í gjár.

Samstundis vísir ein meiningakanning, at flestu evropearar halda minni av USA nú enn undan krígnum í Irak. Í Fraklandi og Týsklandi siga ávikavist 37 og 38 prosent, at tey eru nøgd við USA og tess politikk. Fyri einum ári síðani vóru hesi tølini 43 og 45 prosent og fyri tveimum árum síðani 63 og 61 prosent.



*Bush, forseti, eggjar teimum sameindu hjá USA til at standa saman í Irak*

**Umframt USA hava hesi lond hermenn í Irak: Tølini eru pr. 1. mars 2004:**

| | |
|---|---|
| Bretland | 11.000 |
| Italia | 2.700 |
| Ukraina | 2.000 |
| Spania | 1.300 |
| Póland | 1.300 |
| Niðurlond | 1.100 |
| Avstralia | 1.000 |
| Suðurkorea | 700 |
| Rumenia | 700 |
| Danmark | 496 |
| Bulgaria | 470 |
| Teiland | 460 |
| Honduras | 370 |
| El Slavador | 360 |
| Dom. Lýðveldið | 300 |
| Nikaragua | 270 |
| Mongolia | 180 |
| Aserbajdjan | 150 |
| Noreg | 150 |
| Portugal | 130 |
| Litava | 105 |
| Slovakia | 105 |
| Filipsoyggjar | 95 |
| Kekkia | 80 |
| Albania | 70 |
| Georgia | 70 |
| Ný Sæland | 60 |
| Estland | 55 |
| Kasakstan | 30 |
| Makedonia | 28 |
| Moldova | 24 |



Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

**Citroen ZX 1.9TD**
5 hurðar, km. 139.000, árg. feb 97
**58.000,-**

**Citroen Xsara 2.0 HDi**
5 hurðar, km. 58.000, árg. jun 01
**140.000,-**

**Citroen Xsara 1.9TD stc**
km. 112.000, árg. apr 99
**105.000,-**

**Mitsubishi Carisma 1.8GDi Sedan**
km. 37.000, árg. sep 00
**135.000,-**

**Mitsubishi Pajero 2.5TD 6 pers**
km. 167.000, árg. des 92
v/mvg **75.000,-**

**Ford Fiesta 1.4i Sport**
3 hurðar, km. 86.000, árg. jun 97
**59.000,-**

**Ford Ka 1.3i Kult**
km. 51.000, árg. feb 00
**75.000,-**

**Kia Sephia 1.5GLX**
4 hurðar, km. 75.000, árg. des 96
**55.000,-**

**Kia Sportage 2.0 TD 4x4**
persónbilur, km. 163.000, árg. jan 98
**99.000,-**

**Mazda 626 2.0TDi stc**
km. 120.000, árg. mar 99
sýndur feb 04 **130.000,-**

**Toyota Avensis 2.0D4-D**
4 hurðar, km. 89.000, árg. feb 01
**165.000,-**

**VW Polo 1.9SDi**
4 hurðar, km. 43.000, árg. mai 00
**112.000,-**

**Citroen Jumper 2.5TD LH**
Km. 120.000, árg. aug 96
**v/mvg 105.000,-**

**Fiat Ducato 14 2.5D**
Km. 125.000, árg. apr 96
**v/mvg 75.000,-**

**Mercedes-Benz Vito 110D**
KSV, km. 51.000, árg. sep 98
**v/mvg 130.000,-**

**VW CARAVELLA 10 pers**
km. 99.200, árg. jan 99
**170.000,-**

**Fiat Stilo 1.6i 110hk**
5 hurðar, km. 9.600, árg. okt 02
**155.000,-**

**Fiat Stilo 1.6i 110hk**
5 hurðar, km. 9.600, árg. okt 02
**155.000,-**

**Citroen Xsara 2.0 HDi, 110 hk**
5 hurðar, km. 6.000, árg. sep 03
**182.000,-**

Møguleiki er eisini at royna nýggjar bilar

*Vælkomin til*
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Sosialurin 341800

*Móttøka*
*á Hotel Vágum*

*Hotel Vágar 25 ár*
*Flogfelag Føroya 40 ár*

*Í hesum sambandi bjóða vit viðskiftafólki, samstarvsfeløgum og vinfólki, at verða vælkomin inn á gólvið á Hotel Vágum fríggjadagin 19. mars millum kl. 15.-18.*

*Samstundis takka vit fyrrnevndu fyri gott samskifti, við framhaldandi ynski um gott samstarv.*

*Ein stór tøkk til okkara starvsfólkalið, sum manna felagið.*

FLOGFELAG FØROYA

Sosialurin 341800

# EVANGELISK MØTI



**við Erik og Hildu Bedsvaag**
18.- 21. mars

**Í FILDELFIA, HAVN**
**Í KELDUNI, SKÁLAFIRÐI**

**Møtiskráin sær soleiðis út:**

Hóskvøldið kl. 20.00 møti í **Kelduni**
Fríggjakvøldið kl. 20.00 møti í **Filadelfia**
Leygarkvøldið kl. 20.00 møti í **Kelduni**
Sunnudagin kl. 11.00 møti í **Filadelfia**
kl. 17.00 møti í **Kelduni**

**Øll eru hjartaliga vælkomin**

**Filadelfia** **Keldan**

Toyota - dele
brugte og nye
Vi sender hver dag til Færøerne
Aabenraa Autogenbrug
TEL (+45) 74 61 41 10
FAX (+45) 74 61 41 64
www.dkauto · salg@dkauto.dk

Sosialurin 341800

Visti tú ikki tað? Sosialurin

**Lastbilur til sølu**

MAN 8-150, 8 Tons total, 150 HK 6syl, árg. 1990, ikki vippulast, nýsýnaður, í góðum standi. Selist vegna broytt virksemi, broyttan tørv.

Kr. 50.000,-

**LYFTA**
Eyðun Egholm
Tel 50 31 50 · lyfta@kallnet.fo

**Frá Klaksvíkar Útróðrarfelag**

**Ársaðalfundur**

verður á Klaksvíkar Sjómansheimi sunnudagin 21. mars. kl. 13.30.

Skrá sambært lógum felagsins.

FØÐINGARDAGS TILBOÐ

Í sambandi við at 25 ár eru liðin síðani Skóbúðin læt upp, hava vit nógv góð tilboð komandi viku

byrjað verður
**mánadagin 22. mars**
**kl. 10.00**

Skóbúðin hjá Mundu
FO-520 Leirvík · Tel 44 30 80

Sosialurin 341800